# Sosialurin VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 6. januar 2006



**Spæl fyri lívinum 1:2**
Tónleikakapping fyri ung.
Føroyski Dávur Juul Magnussen er eisini við í kappingini, har virðislønin er 100.000 kr. Fyrst skulu tey 21 bestu spæla alt tað, tey hava lært. Eftir hetta sleppa 12 við til næsta umfarið. Millum tey 21 í kappingini er altso eisini føroyski Dávur Juul Magnussen, sum skal kappast á trombon. Sjálvandi sleppa vit eisini at vita, hvat dómararnir halda um avrikið, og tað kann eisini vera stuttligt at hoyra.
**Sunnudagin kl. 21.10**



**The Sperminator**
Fertilitetsserfrøðingurin, Dr. Cecil Jacobson, sum er útbúgvin í Bretlandi, hevur hjálpt hópin av ráðaleysum pørum í lítla býnum, Alexandria, í Virginia í USA. Hann hevur tó ikki sagt hesum, at hann sjálvur er pápi at øllum hesum børnum. Tá loyndarmálið kom fram, komu granskarar eftir, at Cecil ivaleyst er pápi at einum 75 børnum har um leiðir. Foreldrini vóru skelkað, men sjálvur heldur læknin seg ikki hava gjørt nakað galið. Eisini verður hann stuðlaður av konu síni, sum bara sigur, at tey, sum hava móttikið hansara sáð, hava verið sera heppin.
**Hósdagin kl. 20.00**

**Barcelona**
Ted starvast sum seljari á Barcelona-deildini hjá amerikanska felagi sínum. Hann er heldur forstokkaður, men hetta broytist, tá systkinabarnið, Fred, kemur á vitjan. Fred er alt annað enn forstokkaður, og komandi mánaðirnar verður talan um hópin av dramatiskum hendingum, sum snøgt sagt kollvelta tilveruna.
**Týsdagin kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**